tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 44 Leygardagur 2. mars 1996 70. árgangur Krónur 7,00

## 2'arin í dag:




### Lækni við filmsstjórn sum sergrein

- Eg havi figgjað filmsarbeiðið við at lesa til lækna. Aðrir læknar gerast ofta serfrøðingar á einum øki, men mín læknakunnleiki verður at virka sum avloysari hjá hjálparlæknum, sigur danski filmsleikstjórin Nils Malmros

Síða 14 - 15

### Café og unplugged í Margarinfabrikkini



Temavika hevur verið í Margarinfabrikkini. Tey ungu eru sera nøgd við úrslitið, sum m. a. hevur ymisk nýggj tiltøk við sær so sum cafékvøld og regluligar unplugged-konsertir Síða 10 - 11

## Faroe Seafood Prime gongur nýggjar leiðir:

# Poul saltar fisk í Kina

Bara tíðin fer at vísa, um Poul Michelsen er vorðin ørur í høvdinum, ella um hann bara hevur áræði, vit ikki eru von við í Føroyum. Í hvussu so er, er Faroe Seafood Prime farin undir eina ógvuliga forkunnuga roynd, sum man tykjast flestu føroyingum ógvuliga fremmand: Teir eru farnir at salta fisk í Kina. Síða 4

## Mærsk fær arbeiðið í Lopra




*Maersk Contractors sum er en partur av AP Møller hevur fingið arbeiðið at bora í Lopra*

Síða 2

## Nýggju krøvini um trygdina á sjónum:

# Kostar Strandferðsluni minst 20 milliónir

Tað verður kostnaðarmikið hjá Strandferðsluni at ganga undir tær nýggju altjóða treytirnar, sum nú verða settar bilaferjum og ferðamannaskipum Síða 6

NÝTT SJÓNVARP
Ringið so 19544
DÝRT við nýggjum SJÓNVARPI?
– ikki frá okkum
– beinleiðis av RADIO-VERKSTAÐNUM
TILBOÐ
25" ULTRA sjónvarp
v/ tekst, stereo o.o. hentleikum
Fyrr 7.500,-
Nú bert 5.995,-
Figging fæst!
RADIOVERKSTAÐIÐ v/ Guttorm Mortensen
Lýðarsvegur 15 - 100 Tórshavn - Tlf. 19544

fk
HVØNN DAG Í MARS
Døgurði fyri BERT 25 kr.!
- bert galdandi, um etið verður í matstovuni -
Matstovan í Hoyvík

Norðurlandahúsið ikki skert á hesum sinni

